Listaframsýning í miðbýnum í Havn

Í gjár lat listamaðurin Zakaris Heinesen upp listaframsýning á Torginum í Snarskivuni hjá Tórshavnar býráð.

FRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Snarskivan, ið er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, hússt saman við postavgreiðsluni í gamla posthúsbygninginum í miðbýnum. Hugnaliga forhøllin, nevnd Torgið, verður eisini brúkt til listaframsýningar, sum mentamáladeildin skipar fyri. Síðani Snarskivan læt upp, hava skiftandi framsýningar verið á Torginum, har føroysk listafólk hava sýnt fram, og nú er Torgið karmur um eina áhugaverda framsýning hjá Zakaris Heinesen.

Á framsýningini í Snarskivuni eru 13 oljumálningar og 6 akvarellir, ið eru til sølu.

Framsýningin verður hangandi uppi til fyrst í apríl mánaði.

Høvi er at síggja framsýningina, tá ið opið er í Snarskivuni, mánadag – fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

Sofía Sørensen áttatifimm

Tann 20. februar fylti Sofía Sørensen í Hvannasundi 85 ár.

Fía er er dóttir Margrethu F. Sørensen úr Innistovu í Hvannasudni og Jústa Justesen, vanliga nevndur Jústi í Depli.

Fía var elst av 6 systkjum, men hon kom ikki at vaksa upp saman við teimum. Tav bert ársmál millum tey fýra elstu, og longu tá hon júst var komin yvir stetlingsaldur, kemur hon út til Viðareiðis til Jóhonnu og Daniel Johannes joensen uppi við Garð. Jóhanna var abbasystir hennara, systir Andreas Sørensen bónda í Innistovu í Hvannasundi. Jóhanna og Dáli og tey 4 systkini gjørdust so góð við hana, at tey vildu hava hana at vera verandi. Og hon var bert stutt skifti inni í Sundi, og so kom hon útaftur og vaks upp sum Fía hjá Dála.

Tað sá annarleiðis út uppi við Garð tá. Gamli vegurin varð brúktur, og húsini Niðri í Húsi, Í Frammistovu, á Millaðnum, í Lánni, Eysturi á Gili og hjá Póli á Millaðnum stóðu øll uppi tá.

Her vaks Fía upp, sleit sínar barnaskógvar og gekk øll árini í skúla hjá Poul Enok Hansen niðri á Bakka. Og brátt var hon álitið hjá teim gomlu. Systkini vóru gift, búðu ikki her longur.

Tey høvdu kúgv, fenað og torvið skuldi eisini fáast til høldar. Og mangan strævnan dagin hevði hon inni í Dølum bæði fyri tey gomlu og seinni fyri hennara egna húskið at bera burtur, seta upp, miðskifta, kynda upp í eldar og at enda bera inn í krógv og so seinni laða í búðhjallin. Sama við hoynanum. Hon hoyggjaði tá hoyveður var og kylti so upp um kvøldarnar. Og hon var dúglig roytingarkona. Hon fór at tæna í Onagerði hjá Akseli og Benadiktu, og vinalagið við Benadiktu er eins gott enn; tær hava tíðum vitjað hvørja aðra. Hon tænti eisini í Havn o.a.

Fía v.m. op Benadikta

Fía giftist við Hanus Lind Sørensen, Hanusi hjá Hannufiu og Tummas Jóhan. Tey búðu fyrstu árini í Uppistovu í Follindi og seinni uppi hjá Dála. Í 1948 keypa tey húsini hjá Jákup hjá Trónda Niðri á Bakka, sum tá hevði bygt í gerðinum eysturi í Eiðsvík nærindis Kyrjarheyggi. Hanus sigldi øll árini, tey vóru á Viðareiði og var bert heima um vetrarnar, tey seinastu árini við Atlantsfarinum.

Í 1959 flyta tey inn í Sund at búgva. Hanus tekur tá við sum arbeiðsformaður í fiskahúsinum hjá Kjølbro eftir verpápan, Jústa í Depli, sum legði frá sær.

Tey keypa húsini í Sandarabug, sum Andrias hjá Mortani bygdi. Men Hanus doyr longu í 1964, bert 45 ára gamal, á fjalli í Áardali. Og Fía hevur sitið einkja síðani.

Fía og Hanus fingu trý børn; Andreas, sum býr í Hvannasundi, Hallgerð, sum býr í Havn og Bjørg, sum býr í Keypmannahavn. Ommubørnini eru 10 í tali, langommubørnini 8, og hon er oldurómma at 1 barni.

Nakað eftir, at Hanus var deyður, bygdi Andrias í Gerðinum norðan fyri Sandarabug, og har hevur Fía búð síðani; tey hava hvør sína íbúð. Tó í nøkur ár búði hon á Frederiksberg í Keypmannahavn, tá búðu báðar døturnar niðri.

Tað, sum hevur eyðkent Fíu er, at hon dugir so frálíka væl at umgangast fólk, og vinaskarin er tí eisini rættiliga stórur. Fólk flykkjast um hana. Vildi tú hitta kend fólk ta tíðina, hon búði í Frederiksgade, ja so var bert at fara inn á gólvið hjá Fíu, so hitti tú bæði yngri og eldri bæði av Viðareiði og úr Hvannasundi. Og tað sama er fyri eystan Múlan, tú kemur framvið, steðgar á, støkkur inn á gólvið og sær hana standa við kannuni og skeinkja vinfólkum ein heitan munn, ella hon situr við onkrum plaggi oat gera liðugt, meðan hon prátar við gestirnar. Og ikki minst tey yngru ættarliðini vitja hana, jú, omman og langomman er teimum góð. Tá Fía fylti áttati, var stórur føðingardagur í Hvannasundi. Hesaferð var hon burturstødd. Men sum tann fólkamagnet Fía er, so ivist eg ikki í, at fjøld av fólki hevði møtt upp at heiðra henni.

Hjartaliga tillukku!

Tøkk fyri árini,ið farin eru, Fía, og hav blíðan byr.

Michael

Uppi við Garð

STÓRT TILTAK

Í Argja skúla

Leygardagin 2/3-2002 frá kl. 15.00

Mattombola · Bommtombola · Café
Lutaseðlasøla · Klatriveggur
Skreiðirør · Fiskibrunnur
Hoppiborg · Ponyríðing
Sodavatnssøla

5.b í Argja Skúla

Kristian og Hans Pauli leggja ódámligt uppskot fyri Løgtingið

Teir báðir egna til Løgtingsvalið, men senda kommununum rokningina, heldur Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri

UPPÍLEGGING
Áki Bertholdsen

– Hetta er beinleiðis ódámligt. Hetta er at føra valstríð til Løgtingið fyri pening hjá kommununum.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, er ógvuliga misnøgdur um uppskotið, sum teir báðir javnaðartingmenninir, Kristian Magnuessen og Hans Pauli Strøm nú fara at leggja fyri fyri Løgtingið um avsláttur til foreldur, sum hava fleiri børn í barnaansing. (sí aðrastaðni í blaðnum).

Hann vísir á, at barnansing er eitt málsøki, sum kommunurnar hava fingið at umsita heilt og fult.

– Tí er tað rættiliga ódámligt, at løgtingsmenn nú fara at leggja seg út í málið við tí fyri eyga at áleggja kommununum størri útreiðslur.

– Hetta er at leggja seg út í viðurskifti, sum Løgtingið onki hevur við at gera longur.

Hann vísir eisini á, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu hetta fer at raka tær ymsu kommunurnar.

– Kommunur, sum onga barnaansing hava, sleppa fullkomiliga snikkaleysar, men tað verður rættiliga dýrt hjá kommunum, sum hava góð og fjølbroytt ansingartilboð til sínar borgarar.

– Finnleif Guttesen leggur dent á, at hann er heldur tað ljóðar skilagott at foreldur, sum hava fleiri børn í ansing, skulu fáa avsláttur, tí tað er ein stór útreiðsla hjá teimum.

– Men hetta eru viðurskifti, sum kommunurnar sjálvi eiga at áseta. Antin er málið lagt út til kommunurnar at umsita, ella er tað ikki. Tað er ódámligt, a løgtingið leggur eitt mál út til kommunurnar at umsita, men kortini leggur seg út í, hvussu tað verður umsitið, við tí fyri eyga at áleggja kommununum eykaútreiðslur.

Hann sigur, at tað er ov ofta, at Løgtingið áleggur kommununum eykaútreiðslur og hann stúrir fyri, at hetta fer at vinda upp á seg.

Ikki minst fýlist hann á, at uppskotið frá teimum báðum javnaðartingmonnunum kemur beint í kjalarvørrinum á teimum hørðu atfinningunum, sum kommunurnar høvdu ímóti Løgtinginum, eftir at tað samtykti skattalættan til pensjonistar sum kom at kosta kommununum stórar eykaútreiðslur, stutt eftir at tær høvdu lagt sínar figgjarætlanir.

Høvdu kommunurnar vita av skattalættanum frammanundan, hevði borið til at lagt upp fyri eykaútreiðslunum í figgjarætlanunum.

Men tað tykist ikki sum um løgtingslimir hava lært stórvegis av tí málinum, heldur Finnleif Guttesen.

Familjupolitikkur

– Hetta er heilt burturvið. Sjálvt um málið er lagt út til kommunurnar at umsita, merkir ikki, at Løgtingið skal frásiga sær alla ávirkan til at seta nøkur familjupolitisk tiltøk í verk.

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, sum er annar av uppskotsstillarunum, er alt annað enn samdur við borgarstjóran á Tvøroyri.

Hann sigur, at vit hava eina løgtingslóg um dagstovnar dagrøkt við nøkrum ásetingum í og sjálvsagt eigur Løgtingið at kunna áseta nøkur viðurskifti, eisini á familjupolitiska økinum.

– Tað mátti tvørturímóti verið kærkomið hjá kommununum at kunna veitt húskum við fleiri børnum ein lætta.

Hann heldur tí ikki, at hetta er at leggja seg út í kommunal viðurskifti.

Hann heldur avgjørt heldur ikki, at hetta er at fara ov langt niður í smálutir í eini rammulóg.

– Í løgtingslógini stendur m.a., at foreldragjaldið er 30%, er tað so eisini at leggja seg út í kommunal viðurskifti, spyr løgtingsmaðurin.

Hann sigur, at ætlanin er at uppskotið skal ikki koma í gildið, fyrrenn 1. januar, júst fyri at kommunurnar ikki skulu koma í rasshaft, men hava møguleika at leggja upp fyri eykaútreiðslunum í næstu figgjarætlanini, tí nú fáa tær góða tí at fyrireika seg til tað.

– Tí er hann heldur ikki samdur í, at hetta er at valagn fyri kommunurnar rokning.

– Hetta er eitt familjupoltiskt tiltak, sum kommunurnar fáa góða tíð at fyrireika seg til.

Annars heldur løgtingsmáðurin, at nú uppskotið ikki skal koma í gildið, fyrrenn 1. januar, eigur Landsstýrið at taka upp samráðingar við kommununa um okkurt slag av endurgjaldið aðrar vegir, so at kommunurnar verða skaðafríar, tó at hann ikki uppá standandi fót veit, hvat tað skal vera, men tað eiga at vera nógvir møguleikar.

Hjá foreldrum við fleiri børnum er barnaansing ein figgjarlig byrða. Men Løgtinigiðð eigur ikki at blanda seg uppí, heldur borgarstjórin á Tvøroyri

Myndin er tilvildarlig

NÝTT TELEFONNUMMAR frá 1. mars

TEL 35 12 20

nýggja faxnummarið er 35 12 30

PF LEIF MOHR HANDILIN ELECTRIC FROST

Smyrilsvegur 2 Postboks 3100 FO-110 Tórshavn Faroe Islands
Tel (+298) 351220 Fax (+298) 351230 e-mail: lm@lm.fo www.lm.fo